Todi fer at fáa fleiri møguleikar

FCK vann týskvøldið Super Cup, og venjarin sigur seg ætla at geva fleiri spælarum møguleikan, enn hann gjørdi síðsta kappingarár

ÚTISETI
Jóannes Hansen

Todi Jónsson fekk ein hálvan tíma á vøllinum, táið FC Keypmannahavn í týskvøldið vann 2-1 á AaB í danska Super Cup dystinum.

FCK verður aftur í nýggja kappingarárinum har, sum tað gongur fyri seg í donskum fótbólti. Tað varð staðfest týskvøldið, tá ið FCK í Parkini vann Super Cup 2–1 ímóti AaB. FCK vann, hóast teir í meiri enn ein tíma vóru undirmannaðir.

Bara 26 minuttir vóru farnir, tá ið ein av álititismonnunum á miðvøllinum, Hjalte Bo Nørregaard, fekk reyða kortið. Hann sá reytt eftir tvær ófantaligar taklingar, sum báðar góvu gult kort.

Bæði FCK málini vórðu skorað av verjuspælarum. Vanliga leiktíðin í 1. hálvleiki var farin, tá ið síðuspælarin í høgru, Lars Jacobsen, við fløtum skoti úr eitt sindur í høgru og dygst inn við stólparótini í hinum borðinum skoraði til 1–0.

Todi Jónsson var ikki millum teir fyrstu ellivu hjá FCK. Álvaro Santos og Jesper Bech vóru í álopinum. Tá ið FCK gjørdist undirmannað, varð Jesper Bech fluttur aftur á miðjuna, og so var Álvaro einsamallur á toppinum.

Álvaro tóktist væl upplagdur, men hann megnaði ikki at fáa mál, tá ið hann í 1. hálvleiki fekk møguleikan úr ellivu metrum. Silberbauer varð rendur um koll, og Álvaro sendi brotssparkið í fótin á AaB málverjanum, Jimmy Nielsen, sum varð kosin at vera dagsins maður.

Tá ið tað restaðu 26 minuttir, loysti Todi Jónsson Álvaro Santos av. Hetta var 199. ferðin, at Todi var á FCK liðnum í týdningarmiklum dysti. Tað vil við øðrum orðum siga, at um hann sleppur upp í part, tá ið FCK leygardagin fer at spæla landskappingardyst í Silkeborg, so verður talan um jubileum.

At føroyski spælarin framvegis er væl umtóktur í FCK og í danska fótbóltsheiminum var týskvøldið gott dømi um. Áskoðararnir tóku ímóti honum við eyðkenda rópinum todi, todi, og Svend Gehrs, sum seinastu fjórðings øldina hevur verið best umtókti danski frásøgumaðurin í sjónvarpinum, hevði saman við fyrrverandi landsliðsmálverjanum Peter Kjær,ið var medkommentator, eina rúgvu av positivum lýsingarorðum at siga um FCK álopsmannin. Teir vóru eitt nú samdir um, at tað er luksus trupulleiki hjá FCK, at tað ikki er pláss fyri einum so góðum álopsspælara millum teir fyrstu ellivu.

Todi tóktist væl upplagdur ta løtuna, hann var á vøllinum. 2-0 málinum átti hann sín stóra part í. Eftir stikkbólt fram ímillum smekkaði hann til úr eitt sindur spískum, AaB málverjin blokeraði til horna. Bólturin varð lagdur innfyri og útfrá. Tá ið bólturin varð lagdur innfyri aftur, legði Todi við høvdinum bóltin fyri føturnar á miðverjanum Ole Tobiasen, sum úr seytjan metrum smekkaði dygst úti við stólparótina.

Fram ímóti dystarenda sneiddi Todi framvið málverjanum, men vinkulin gjørdist og spískur.

AaB minkaði um munin stutt eftir, at FCK hevði økt til 2–0. Málið fingu teir eftir horna, og síðstu løtuna royndu teir við longum sendingum at leggja trýst á FCK verjuna, sum kortini megnaði at halda tørn.

Fleiri fáa møguleikan

Týsdagin seldi FCK verjuspælaran Boro Zivkovic til norska Fredrikstad. Tveir spælarar eru ikki førir fyri at spæla, tí teir eru skaddir. Annar teirra er málverjin Magnus Kilhsted, og hin er Sibusiso Zuma, sum er lærskaddur. Tað verður roknað við, at hann verður førur fyri at spæla aftur miðskeiðis í august.

Men tað er kortini stór kapping um plássini á FCK liðnum. Teir eru omanfyri tjúgu, sum venja saman, og FCK venjarin, Hans Backe, segði fyrr í vikuni, at hann roknar seg at hava 15–16 spælarar, sum eru javnt góðir.

Í fjør var tað fram ímóti kappingarenda ikki meiri, enn at FCK fekk mannað lið. Ein rúgva av spælarum vóru skaddir. Tá varð mett, at orsøkin til summar skaðar var, at spælararnir høvdu spælt ov nógv.

Nú sigur Hans Backe, at hann í summar og næstu tveir mánaðirnar ætlar at nýta rotatiónsprinsippið, sum varð so nógv umrøtt, tá ið Chealsea nýtti tað í fjør. Backe ætlar, at spælararnir skulu leypa einstakar dystir um, soleiðis at teir alla tíðina eru heilt væl fyri. Tað vil við øðrum orðum siga, at eisini teir, sum síðsta kappingarár vórðu roknaðir sum lyklaspælarar og tískil vóru á liðnum hvørja ferð, teir næstu mánaðirnar fara at hvíla viðhvørt.

Ætlanin hjá FCK venjaranum er so í toppdystum í landskappingini og í Europa Cup at toppa liðið, sum tað plagar at verða tikið til í Ishockey.

FCK skal spæla fyrstu dystirnar í Europa Cup 28. juli og 4. august.

VB hevur fyrireikað seg á Fyn

Umframt at hava vant eina og tvær ferðir um dagin hava vágbingar spælt tríggjar dystir á Svendborg leiðini

VB VENJINGARLEGA
Jóannes Hansen

Í dag kemur VB aftur úr Danmark, har teir síðstu vikuna hava verið á venjingarlegu. VB hevur verið í Svendborg og fyrireikað seg til seinna partin av landskappingini. At teir akkurát valdu at fara til Svendborg mundi komast av, at tveir av VB monnunum hava gott samband tann vegin. Annar teirra er verjuspælarin Anders Sørensen, sum er ættaður úr Odense, men sum seinastu sjey árini hevur búð í Svendborg, og hin er ungdómsvenjarin hjá VB, John Christensen, sum er ættaður úr Svendborg.

VB hevur vant tvær ferðir um dagin burtursæð frá teimum døgunum, tá ið teir hava spælt venjingardystir. Tá hava teir vant fyrrapartin og spælt seinni um dagin.

– Vit hava fingið væl burturúr, og vit vóna og rokna við, at hetta hevur verið ein góð fyrireiking til tey nýggju umførini, sum standa fyri framman í landskappingini.

Hetta var stutta viðmerkingin, sum vit fingu frá VB málverjanum, Bjarna Johansen, tá ið vit fangaðu hann í fartelefonini úr Svendborg fyrrapartin í gjár.

Í gjárkvøldið skuldi VB spæla síðsta venjingardystin. Hann skuldi vera ímóti Svendborg. Frammanundan høvdu teir spælt tvær ferðir. Báðu ferðirnar var tað ímóti 2. deildarfeløgum á Fyn.

Fyrri dysturin var ímóti Næsby. Á VB heimasíðuni, vb1905, verður sagt, at fyrra umfarið var rættuliga tætt, og at støðan í steðginum var 1–1. Í 2. hálvleiki gjørdi VB fleiri útskiftingar, tveir vágbingar vórðu vístir av vøllinum, og so vann Næsby 5–1.

Seinna royndin var ímóti gamla stórfelagnum í Odense, B1909, sum nú altso er í 2. deild. VB tapti 4–2 fyri B1901.

Í VB ferðalagnum, sum kemur aftur í Vágar í dag, eru 22 fólk. Sekstan teirra eru fótbóltsspælarar. VB skal í morgin og leygardagin luttaka í Lions Cup, sum verður í Hvalba og í Vági. Í dag skal VB spæla ímóti TB, og í morgin skulu teir spæla ímóti Sumba ella Royn.

Í 10. umfarinum í landskappingini skal VB spæla á heimavølli ímóti NSÍ. Undan summarsteðginum gekk tað leingi væl hjá VB, men so var úrtøkan eitt sindur soltnari. VB er eftir nýggju tey fyrstu umførini á sætta plássinum við trettan stigum. HB, sum VB tapti ímóti í hálvfinaluni í steypakappingini, er oddalið við tjúgu stigum.

Ólavsøkurenningin 2004

Týsdagin tann 27. juli kl. 1830 skipar Bragdið fyri rennikappingum á Skálatrøð í Havn. Kappast verður í ymsum bólkum hjá bæði vaksnum og børnum. Startur og mál í øllum kappingunum er á Skálatrøð

Byrjað verður kl. 18.30, tá vaksin renna 5 km. Runnið verður nakrar ferðir runt niðri á Skálatrøð og út á Bakka.

Hóast øll tey vaksnu byrja í senn, so verður kappast í tveimum aldursbólkum: vaksin fødd í 1986 ella fyrr, og vaksin fødd í 1958 ella fyrr (veteranar). Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2 og 3 í báðum bólkunum.

Kappingin á Ólavsøku er samstundis síðsta umfar í árligu Grand Prix kappingini fyri vaksin og børn. Á heimasíðuni www.athletics.fo er kunning um støðuna í Grand Prix kappingini, undan Ólavsøku.

Børnini byrja at renna kl. 19.15 tá dreingir og gentur - 7 ár (f. 1997 ella seinni) renna eina ferð runt, t. e. 600 m. Síðani renna dreingir og gentur - 10 ár (f. 1994-1996) sama tein

Tey størru børnini skulu renna 2 ferðir runt, t. e. 1200 m. Kappast verður í hesum bólkum: dreingir og gentur - 13 ár (f. 1991-1993) og dreingir og gentur - 17 ár (f. 1987-1990).

Nr. 1, 2 og 3 í teimum ymisku bólkunum hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki.

Handan av steypum til nr. 1, 2 og nr. 3 í Grand Prix kappingini hjá bæði vaksnum og børnum, verður eftir at fremstu rennararnir á Ólavsøkurenningini eru heiðraðir.

Tilmelding kann bert gerast á www.athletics.fo og startnr. skulu heintast uttan fyri handilin hjá P/F Valdemar Lutzen kl. 17.30-18.30. Luttøkugjald kr. 50,00 fyri vaksin og kr. 30,00 fyri børn skal gjaldast í sambandi við avheintan av startnr. Tilmeldingarfreistin er úti mánakvøldið tann 26. juli.

Skrá:

17.30 Heintan av startnummari á Skálatrøð
18.30 Vaksin (fødd í 1986 ella fyrr) renna 5 km
19.15 Børn - kappast í hesi raðfylgju:

Børn - 7 ár (f. 1997 ella seinni) renna 600m
Børn - 10 ár (f. 1994-1996) renna 600m
Børn - 13 ár (f. 1991-1993) renna 1200m
Børn - 17 ár (f. 1987-1990) renna 1200m

20.30 Heiðursmerkja- og steypahandan

Familjudagur í miðbýnum 24. juli 2004

Havnar Fimleikafelag skipar fyri stórum tiltaki í gongugøtuni og á Vaglinum í Havn. Tiltakið er ætlað allari familjuni og byrjar kl. 10 leygarmorgunin.

Vikuskiftið undan ólavsøku skipar størsta fimleikafelagið í landinum fyri stórum tiltaki í miðbýnum í Havn. Eins og fimleikurin í felagnum er ætlaður øllum aldursbólkum, so verður familjudagurin eisini lagdur soleiðis til rættis, at øll í familjuni hugna sær.

Børnini hugna sær bæði við fiskibrunni, tombola, barnakarusell og hoppiborg. Tey vaksnu fáa leygardagin avbera góðan møguleika at fylgja við mótanum, tí klædnahandlarnir í miðbýnum sýna fram alt tað nýggjasta.

Øll, ið leita sær oman ímóti pallinum á Vaglinum kunnu hugna sær við Angelu og Hannibal, eins væl og framsýningini, ið FM-fimleikararnir leggja til rættis. Fimleikur fevnir vítt og tí fara ung eisini at sýna fram bæði HipHop og Breakdance.

Tiltakið byrjar kl. 10 og heldur á til kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin og vónar Havnar Fimleika-felag sjálvsagt, at føroyingar nýta hetta høvi at savnast í gongugøtuni - eisini at njóta framúrskarandi fimleikasýningina, ið FM-fimleikararnir sýna fram.

Skráin fyri familjudagin 24. juli 2004:
Kl. 10.00 letur økið upp við fiskibrunni, mat- og bommtombola, pylsuvogni, sølubúð v/vaflum og kaffi, barnakarusell og hoppiborg.
Kl. 11.00 verður framsýning á pallinum á Vaglinum. FM-fimleikarar fara at sýna fram kynstur og ung fara at dansa hiphop og Breakdance.
kl. 13.30 undirhalda Angela og Hannibal á pallinum á Vaglinum.
kl. 14.00 verður mótasýning við handlunum í miðbýnum. Luttakandi handlarnir eru, Sirri, Fljóðið, Kallkyn, Mótaskálin, Skálabúðin, Thomas Dam Ítróttur, X-Size, Wrangler Shop, Siri, Snældan, Bamsan, Línbúðin, Kissa, Alv, Fótbúni, Touché og Vougue.
Angela og Hannibal undirhalda í steðginum.
Kl. 16.00 verður framsýning á pallinum á Vaglinum. FM-fimleikarar fara at sýna fram kynstur og ung fara at dansa hiphop og Breakdance.
Kl. 17.00 letur økið aftur.

Ólavsøkubridge

Aftur í ár skipar Bridgehúsið í Havn fyri einari bridgekapping á Ólavsøku, Hvat fyri kappingarháttur, sum verður nýttur, er enn ikki avgjørt. Kappingin byrjar 25. juli kl 14:00. Tilmelding á staðnum. Góðir vinningar.

Føroyskur "vadesten"

Føroyska Bridgelandsliðið, ið júst er afturkomi úr Malmø, har tað hevur luttikið í Europameistarakappini í Bridge, hevur havt tað sera trupult. Kortuni høvdu føroyingarnir fleiri framúr góð spøl. Heðin Mouritsen, sum er ein av teimum royndastu bridgespælarunum, hevði hetta sera vakra spælið.

Meldið er 6 spar, sum nokk er í meiralagi.

_ 52
_ -
_ K10985
_ EB7532
N

_ 10986 _ D7
_ 754 V Ø _ K10862
_ B642 _ 73
_ K10 _ D864
S
_ EKB43
_ EDB93
_ ED
_ 9

Vestur spælur kleyvar 10 út. Heðin tók við essinum, rútara til frúgvuna, hjartara til trumf, kleyvara til trumf og síðani tók Heðin fyri spar ess, kong, bónda og hjartar ess .
Við trimum kortun eftir var støðan henda:

_ -
_ -
_ K10
_ B
N

_ 10 _ -
_ - V Ø _ K10
_ B6 _ -
_ - _ D
S
_ 4
_ DB
_ -
_ -

Spar 4 fór til spar 10 hjá vestan, sum nú varð nýttur sum "vadesten" fyri at sleppa inn til borið, vestur mátti spæla rútar 6 aftur, Heðin legði flott rútar 10 til á borðinum og fekk síni 12 stikk !!

VARPIÐ
Skráir og ummælir
16 síður
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá
TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network
Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel
Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2